Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag ávarar:

Vit gera einki fyri at fyribyrgja stórdálking

-Oljuvinnan nærkast og lítið og einki verður gjørt at fyribyrgja møguligari stórdálking. Tørvur er m.a. á fleiri flótibyrgingum og útgerð at taka upp og goyma olju segði formaðurin í FNU, Kári Thomsen ma. á aðalfundinum hjá felagsskapinum í Havn í gjár. Um tey ymsu málini teir arbeiða við segði hann:

Árið 1994-1995 hevur, sum senna árið, verið merkt av minni aktiviteti, tó at 6 nevndarfundir eru hildnir og nøkur mál hava verið frammi, m.a. ruskinnflutningurin hjá Tórshavnar Kommunu, friðing av Slættaratindi, dálking/aliloyvi á Hovsvøtnum, verkætlan til royndarinnsavnan av pappíri til endurnýtslu o.a.

Kári Thomsen, formaður í FNU

Hølisviðurskiftini gera sítt til, at tungt kann vera at fáa reglusemi í náttúru- og umhvørvismálini, og somuleiðis at kunna røkja samskiftið við innan- og uttanlands feløg og stovnar.

Nevndin hevur fleiri ferðir heitt á landsstýrið um stuðul til felagið, men til fánýtis. Aftur í ár er umsókn send 31. januar um stuðul sambært grein 11 í fíggjarløgtingslógini fyri 1996 og reglugerð fyri umhvørvisverndartiltøk frá 1994. Setta eru av 1 mill. kr. til umhvørvisvernd, og hevur FNU søkt um stuðul til m.a. verkætlanir til royndarinnsavnan av pappíri og battaríum. Pappírsverkætlanina høvdu vit frammi í 1987 í smb. við Umhvørvisráðstevnuna. Einki frættist aftur frá landsstýrinum og rykt verður eftir einum svari.

Sakin um Trøllavík er fingin upp á pláss soleiðis at allar fyriskipanir um frárensl eru í lagi. Trøllavík verður nú miðstøð fyri ruskinnsavnan í Suðuroy. Tyrvt verður og sent til brenningar í Leirvík. Nógv kann enn gerast við minking av rusknøgd og avmaring í tyrving. Tyrvingarplássini fyllast skjótt og má fylgjast við hvussu farið verður fram.

Ruddingardagar eru hert í nøkrum kommunum. Tosað er um felags ruddingardag, men kann tað vera torført at skipa. Uppskot er frammi at geva rósu/viðurkenning til vakrastu/reinastu bygd/bý í landinum. Hetta kann vera torført, tí at fleiri bygdir/kommunur eru sera vakrar og reinar og hegnisliga skipaðar í búsetaing og náttúru.

Hugtakið kann víðkast til eisini at fevna um viðurkenning til persón ella felag, ið hevur víst munagott og nýtt náttúru- ella umhvørvistiltak. Onkur hevur havt frammi, at IRF átti at staðið fyri tiltakinum, við tað at IRF kemur í allar bygdir í landinum. Hesum eru ikki øll samd í, tá IRF burturav skal taka sær av renovatión, spillvatni o.ø. Vakrasta ella reinasta umhvørvi fevnir víðari enn so, og hevur FNU í virki og verki sínum nógv breiðari støði at standa fyri at avgera um ella hvør hevur viðurkenning uppiborna. Málið er ikki víðari viðgjørt í nevndini.

Sakin um burturtøku av sandinum í økinum Líknir í Eiðis kommunu varð viðgjørd av friðingarnevndini á tann hátt, at áheitan varð send til felagið Sandgrevstur at steðga grevstrinum. FNU hevur fyri mánaða síðan fingið svarskriv frá friðingarnevndini, har sagt verður, at burturtøka av sandi ikki má koma fyri, og at tað er sera óheppið at tað við millumbilum hendir at sandur verður tikin. Sakin er fyribils útsett til friðingarnevndin hevur verið á staðnum við Líknir.

Í sambandi við mótmælisskriv til ensku stjórnina um geislavirkna dálking frá Dunreay og ætlanir teirra at sleppa størri nøgdir av spillvatni í havið, hava vit sent skriv til Norges Naturvernforbund, har vit biðja teir um møguligar upplýsingar um nøgdir av geislavirknum evnum í m.ø. Barentshavinum.

Ráðgevandi umboðsráð ferðavinnunnar hevur fund í november. Støðan er ikki batnað tað stóra í tænastustøðinum innan ferðavinnu. Reglur um gongu- og uppihald í náttúruni eru gjørdar, men alt ov illa lýstar.

Hagagøturnar eru ikki loyvdar at brúka í bólkum uttan so at hagastýrið ella bóndin hava givið loyvi, og enn finnast føroyskar reglur ikki fyri siglu/fiskiturum við føroyskum bátum.

Nógv restar enn í at fáa alt at rigga frá almennari síðu, samstundis sum ferðafólkatalið ikki økist nevnivert og vinnan letur illa at rakstrinum.

Seinasta skriv varð sent landsstýrinum í mars 1994, at seta bann móti at ferðafólk og onnur savna og flyta av landinum ótilgjørdar hálvgimsteinar, tiðnur, malargrót og steinamosa. Eisini at bann varð sett fyri at taka egg og ungar. Reglurnar eru komnar, men sera illa hildnar.

Nógv eftirlýsta ferðavinnuskipanin er lidug. Hetta er tekst- og korttilfar, ið vísir hvar áhugavert náttúru- og djóralív finnst. Landið er skipað í oyggjapartar, Suðuroy, Sandoy osfr., og víst er hvar øki finnast, ið hava serligt atlit til t.d. útgrevstur og forn øki, fuglalív, serligt plantu- og djóralív, gøtur, vøtn o.a.

Eiðis verkætlanin er ikki slept av SEV, sjálvt um innsavnaðu mátingar av avfallinum vístu at nøgdin vaks við hæddini. Borast skal til áirnar í Funnings- og Skálafirði. Landsstýrið hevur sett ymsar treytir við, m.a. at SEV tryggjar smoltframleiðsluni í Funningi. Fylgt verður við gongdini í SEV-málinum.

Sjónliga dálkingin finnist enn fleiri staðir í landinum. T.d. Saksunardali síggjast enn uppøtærd landbúnaðaramboð, spreingimáttur, dekk o.a., eins og fjøran í Skálabotni og aðra strendur við eru illa dálkaðar av alskyns burturkasti. Fleiri grótbrot og útgrevstrar verða brúktir til goymslu av vega- og landbúnaðaramboðum. Hetta skemmur og týður uppá líkasælu at halda alt snøgt og ruddiligt.

Gamlar rusk- og flutningsbingjur síggjast í nýtslu í bygdum sum óbygdum øki til goymsluhús í landbúnaði. Hetta skemmur almikið og sømir seg illa.

Oljuvinnan nærkast og lítið og einki verður gjørt at fyribyrgja møguligari stórdálking. Tørvur er m.a. á fleiri flótibyrgingum og útgerð at taka upp og goyma olju.

FNU eigur at hava umboðan í Oljuráðleggingarnevndini tá umhvørvismál hava avgerandi týdning í fyriskipan og rakstri innan oljuídnaðin. Kannað verður um ráðleggingarnevndirnar í Hetlandi og Norra hava umboðan úr natúrverndarfeløgunum.

Tórshavnar kommuna flutti í februar í ár inn góð 40 tons av ruski til brenningar. Hetta skuldi vera ein roynd at fáa rakstur í KOB og at útflyta øsku ella ilskuna. Málið bleiv ein rættulig gøla fyri kommununa og bleiv tað við royndina, ið bert fáir býráðslimir og so brennistaðarstjórin mettu sum skilagóða. Mótmælisskriv bleiv sent landsstýrinum og víst á tørvin at fáa lóg ella kunngerð um bann móti innflutningi av ruski til brenning/viðgerð ella goymslu. Ivasamt er um landsstýrið kemur við nøkrum reglum, og eigur tí at verða rykt eftir lógarsmiðinum. Vit rokna ikki við at Tórshavnar kommuna finnur upp á fleiri smartar ruskloysnir, men vit mugu álíka væl vera á varðhaldi.

Staðfest varð at roykreinsanin ikki var í lagi, og má tí haldast á fram at krevja best viðurskifti sett í rættlag.

FNU var boðið til umhvørvisfund hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, ið hildin varð á Hafnia 15. febr. Fólk frá starvsstovuni søgdu frá um arbeiði innan m.a. skráseting og tiltøk til reinsan av drekki- og brúksvatni.

Roynir vórðu gjørdar við sankutøðum í húsarhaldunum. Hjá nøkrum eydnaðist væl, og komst tað mest av áhuga at røkja tøðini.

Áheitanin kom í vár til FNU at hjálpa til at fáa Slættaratind friðaðan. Málið tók seg upp tá tað hoyrdist at Atlantic Airways/Tyrludeildin hevði í ætlan at gera ferðafólkaturar til og frá Slættaratindi. Áheitan er send friðingarnevndini, sum á fundi 21. febr. viðgjørdi málið uttan at gera nakra niðurstøðu. Nevndin ynskir fleiri upplýsinga og hevur útsett sakina.

Nýliga kom áheitan frá Sílaveiðifelagnum í Suðuroy. Teir biðja um hjálp, so Hovsvøtnini verða spard fyri øðrum 20 árum við smoltloyvi. Rotanon var frammi til viðgerð av sjúku á vatninum, men er eingin viðgerð farin fram enn. Vit hava sent mótmælisskriv til landsstýrið, við áheitan um ikki at geva smoltloyvi á vøtnum okkara.

Nevndin, 19. apr. 1996



Vit gera einki fyri at fyribyrgja eini møguligari stórdálking í sambandi við eina komandi oljuvinnu segði formaðurin í FNU á aðalfundinum í gjár

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan

Skrásetingar-nr.
P/f 1813,
P/f Faroe Seafood Supply Ltd.

Viðtøkur broyttar:
24.11.1995

Nýtt navn: P/f Frá 22. November 1995

Nevnd:
Farin úr nevndini: Frank Uhrenholt, c/o F. Uhrenholt Fisk A/S, Odensevej 11, 5500 Middelfart, Johan Páll Joensen, 700 Klaksvík og Jóhan Joensen, 410 Kollafjørður.
Innkomin í nevndina: Jógvan P. Lassen, adv. (formaður), 100 Tórshavn, Anna Dam, adv.ft., 100 Tórshavn og Ingi Højgaard, adv.ft., 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya
tann 19. apríl 1996

Kristin Balle